

# 11.300 leys størv í norsku frálandavinnuni

**Jan Müller**

11.06.2014 - 17:21

Oljan.fo

Í fleiri ár hava fjølmiðlar skrivað um tann stóra tørvin á verkfrøðingum í Noregi og Danmark, men í roynd og veru hevur tann norska frálandavinnan eisini tørv á fólki við fleiri øðrum førleikum.

Ein uppgerð hjá norsku arbeiðsávísingini NAV vísir, at í løtuni eru 11.300 størv leys í oljuvinnuni, og uppgerðin vísir, at tað er ikki bara tørvvur á verkfrøðingum.

-Vinnan er í stórum vøkstri, og tað ger, at tørvur er á starvsfólki. Talan er ikki bara um verkfrøðingar, men eisini um onnur starvsfólk, sum eru neyðug fyri at fullføra eina verkætlan, skrivar offshore.no.

Eitt brot úr uppgerðini hjá NAV yvir talið á leysum størvum sær soleiðis út:

Sveisarar 1.250

Elektrikarar 800

Byggiverkfrøðingar 750

Elektroverkfrøðingar 700

Jarðfrøðingar og geofysikarar 400

Plátusmiðir 300

Skipsmaskinistar 250

Tekniskir teknarar 50

Kavarar 50